LANDSVERK
byggir land

BYGGISKRÁ

Búheim og umlættingarheim til børn og ung við autismu

"bygging av bú- og umlættingarheimi við tilknýttum dagtilboði til børn og ung við autismu"

September 2017

Innihald

1.0. Inngangur 4
1.1. Verkevni 4
1.2. Byggiánari og byggiharri 5
1.3. Brúkarar 6
1.4. Byggiøki 6
1.5. Virksemi og bygnaður 6

2.0. Skipan av byggimáli 7
2.1. Skipan undir skriving av byggiskrá 7
2.2. Skipan undir restini av verkætlanini 7

3.0. Fortreytir 8
3.1. Lógargrundarlag 8
3.2. Byggiøkið 8
3.3. Atkomuvegir 8
3.4. Veðurlag 9
3.5. Veitingar 9
3.6. Lendisviðurskifti 9
3.7. Myndugleikakrøv 9

4.0. Krøv og ynski til byggimálið 10
4.1. Krøv og ynskir til byggimálið 10
4.2. Burðardygd 10
4.3. Ljóðviðurskifti 10
4.4. Inniumhvørvið 11
4.5. Fólk við breki 11
4.6. Virksemi í bú- og umlættingarheiminum 11
4.6.1. Búeind 11
4.6.2. Umlættingareind 13
4.6.3. Virkniseind 14
4.6.4. Starvsfólkaeind 16
4.6.5. Úthús 17

5.0. Skipan av byggiøkinum 18
5.1. Lendið 18
5.2. Økið uttanum 18
5.3. Atkomuvegir 18
5.4. Parkering 18
5.5. Staðseting av bygningi á økið 19

6.0. Tøkni og veitingar 20
6.1. Veitingar (til bygningin) 20
6.2. Innleggingar (í bygninginum) 20
6.3. Luftskifti 21
6.4. Ljós 21
6.5. Tele- og net 21

7.0. Krøv og ynski til bygningslutir 22
7.1. Konstruktiónir 22
7.2. Framsíður 22
7.3. Tekja 22
7.4. Vindeygu og størri glasfeltir 23
7.5. Skilaveggir 23
7.6. Gólv 23
7.7. Loft 24
7.8. Út- og innhurðar 24

8.0. Krøv og ynski til innbúgv og útbúnað 25
8.1. Innbúgv og útbúnaður 25

9.0. Heilsa, Trygd og Umhvørvi (HTU) 27

10.0. Fíggjarlig viðurskifti 28

11.0. Tíðarætlan 29

12.0. Rakstur Og Viðlíkahald (ROV) 30
12.1 Prosjektering (ROV) 30
12.2 Gransking (ROV) 30
12.1. Avhendan (ROV) 31

13.0. Gransking og góðskutrygging 33

14.0. Fylgiskjøl 34

1.0. Inngangur

Henda byggiskrá umrøður bygging av bú- og umlættingarheimi í Tórshavn fyri børn og ung við autismu. Heimið skal byggjast á matr. 1000a í Tórshavn og fevnir bæði um bygning, atkomu, parkeringarøki og uttanumsøki.

Byggjast skal eitt heim umleið 900 m² í einari hædd. Heimið skal á ongan hátt líkjast einum stovni, men heldur einum privatum heimi og skal tískil fella væl inn í umhvørvið. Heimið er býtt upp í fýra ymiskar eindir og skulu einstøku eindirnar ikki órógva hvørja aðra, men heldur stuðla upp undir virksemið í hvørji einstøku teirra.

Fólk við autismu eru sera ymisk og hava hvør sín serstakan tørv, hetta skal heimið kunna rúma. Búfólkið skal kenna seg væl í heimligum tryggum umhvørvi, samstundis við at heimið er opið fyri heimabúgvandi børnum og ungum við autismu, har hesi koma á Virkniseindina at gagnnýta ymsar hentleikar, sum eindin hevur at bjóða.

Alt byggiøkið skal hugsast inn í verkætlanina. Staðseting av atkomu og parkeringarøki skal loysast á skynsaman hátt, har hugsanin um eitt privat heim skal raðfestast høgt. Uttanumøkið kring heimið skal rúma uttandura aktivitetum av ymsum slagi. Týdningarmikið er, at heimið er væl vart móti vind og regni og ikki minst móti larmi. Samlaða byggiøkið er áleið 4000 m².

1.1. Verkevni

Landsstýriskvinnan hevur tikið avgerð um at seta eina bygginevnd at koma við einum tilmæli um bygging av einum bú- og umlættingarheimi í Tórshavn til børn og ung við autismu.

Heitt verður á bygginevndina um at lata úr hondum eitt tilmæli, sum tekur fyrilit fyri eini bygging, ið fevnir um 6 búpláss, 6 umlættingarpláss og eitt dagtilboð til áleið 15 børn og ung.

Bygginevndin hevur viðgjørt arbeiðssetningin og er komin til ta niðurstøðu, at verkætlanin skal fevna um eitt bú- og umlættingartilboð við tilknýttum dagtilboði í Tórshavn til børn og ung úr øllum Føroyum, hereftir eisini nevndir borgarar. Bygningurin skal húsa 6 búfólkum, hava 6 umlættingarpláss, og skal verða karmur um dagtilboð til 16 borgarar.

Heitt verður á bygginevndina um at kanna, um stovnurin kann byggjast á grundstykki við Karlamagnusarbreyt í Hoyvík, sum Tórshavnar kommuna vísir á. Um hetta ikki er gjørligt, verður heitt á bygginevndina um at kanna aðrar møguleikar í Tórshavnar kommunu.

Bygginevndin hevur viðgjørt staðsetingina av heiminum, og metir tað vera sera týdningarmikið, at hugsað verður um allar borgarar, tá staðsetingin skal finnast. Heimið skal liggja væl fyri tætt við náttúruna, tí hendan er ein aktivur partur av gerandisdegnum hjá fastbúgvandi borgarum og borgarum til umlætting. Somuleiðis skal heimið verða lætt atkomuligt fyri borgarar, sum klára seg sjálvar og ætla sær til frítíðarvirksemi um dagin ella kvøldið. Bygginevndin saman við autismufelagnum hevur valt at staðseta bú- og umlættingarheimið á Eirargarði, við atkomu frá Heygsvegnum. Her er stutt oman í Sandá og Sandagerð, og býbussurin steðgar beint við heimið.

Bygginevndin setir fram ynskir um, at henda verkætlan skal verða fyrimynd fyri framtíðarbygging av hesum slagi.

Meiri nágreinilig krøv og ynskir frá bygginevndini eru lýst seinni í hesi byggiskrá.

1.2. Byggiánari og byggiharri

Byggiánari:
Almannamálaráðið
Eirargarður 2
FO-100 Tórshavn
amr@amr.fo

Byggiharri/ráðgevi:
Landsverk
Tinghúsvegur 5
FO-110 Tórshavn
lv@lv.fo

Bygginevnd:
Kristjan Árnason, Formaður
Almannamálaráðið - Fulltrúi
kristjan.arnason@amr.fo

Súsanna Nordendal
Almannamálaráðið – Fulltrúi
susanna.nordendal@amr.fo

Hermann Mortensen
Almannaverkið – Stjóri Trivnardepilin
hermannm@av.fo

Poula Djurhuus
Almannaverkið - Eindarleiðari
poulad@av.com

Verkætlanarleiðari:
Jón O. Sólsker
Landsverk – Byggideildin
joso@lv.fo

Yvirskipaða uppgávan hjá bygginevndini er at tryggja, at starvsfólkini og brúkarar av heiminum í Havn fyri autistar fáa virðiligar karmar at nýta og virka undir, og mæla til loysnir í byggimálinum, sum eru í samsvari við hetta og ásettu yvirskipaðu karmarnar.

Bygginevndin skal hava eftirlit við, at valdar loysnir verða framdar í verki.

Arbeiðssetningurin hjá bygginevndini er at:

- Saman við Landsverki taka lut í fyrireikandi arbeiðinum, herundir
  - Seta upp tørv, krøv og ynskir til ætlaða heimið í Havn fyri autistar
  - Gera byggiskrá, sum skal verða grundarlag fyri skipanaruppskoti
- hava eftirlit við, at skipanaruppskot og prosjekt er í samsvari við tað, sum ásett er í byggiskránni
- tryggja fakligu góðskuna við atliti at funktiónaliteti, góðskustøði og byggilist og gera tilmæli í hesum sambandi, herundir útvega neyðugar upplýsingar / metingar frá eitt nú brúkarum og/ella øðrum serkønum
- Viðgera møgulig broytingaruppskot, ið ávirka funktiónalitet, góðsku og byggilist, og gera tilmæli í hesum sambandi
- Gera tilmæli til arbeiðsánaran, so hvørt sum tær einstøku fasurnar í byggitilgongdini eru loknar.
- Kunna arbeiðsánaran um øll týðandi viðurskifti, so hvørt sum arbeiðið líður.

1.3. Brúkarar

Bygginevndin hevur sett seg í samband við Autismufelagið og hevur biðið felagið komið við teirra ynskjum til byggingina soleiðis, at teirra vitan um borgararnar kann stuðla upp undir arbeiðið hjá bygginevndini at skriva byggiskránna. Felagið kom við sínum tilmæli og luttók eftirfylgjandi á fundi við bygginevndina. Nevndin arbeiðir víðari við byggiskránni út frá niðurstøðuni frá fundinum.

Bygginevndin hevur eisini boðið Autismufelagnum á fund um staðseting av heiminum. Greitt var frá, hvørjar staðsetingar hava verið uppi at venda og lagt var upp til, at Autismufelagið kom við teirra útsøgn um staðseting til bygginevndina. Bygginevndin hevur fylgt ynskjunum hjá Autismufelagnum.

1.4. Byggiøki

Byggiøkið er partur av ognini hjá Føroya Landsstýri, matr.nr. 1000a, Tórshavn. Tillutað byggiøkið til hesa verkætlan er 4000 m² og liggur sunnan fyri Sambýli Eystan Heyg, matr.nr. 1000e. Byggiøkið er í løtuni ikki sundurbýtt.

1.5. Virksemi og bygnaður

Verkætlanin hevur til endamáls at útvega betri karmar til børn og ung í Føroyum við autismu: Børn og ung, sum av ymiskum orsøkum hava tørv á búplássi, umlættingarplássi og ymsum stuðulstilboðum í gerandisdegnum. Tørvur er í dag á einum nýggjum stovni og eru í løtuni børn á bíðilistanum til búpláss. Komandi árini fer tørvurin at vaksa, og mett er tí, at neyðugt er at taka hond um hesa avbjóðing.


Bú- og umlættingarheimið við tilknýttum dagtilboði skal virka sum heim fyri búfólkum, har hesi føla seg trygg í heimligum umhvørvi, og har stimbrað verður undir trivnaðin. Eisini skal heimið taka ímóti borgarum í avmarkaða tíð, har hesi koma til umlætting og samstundis avlasta foreldur og avvarðandi í heiminum. Heimið skal geva borgarum ymiskar upplivingar, sum hava mennandi innihald. Heimið skal somuleiðis veita dagtilboð til heimabúgvandi børn og ung, har ymiskt frítíðarvirksemi kann menna og stuðla tey.

Tá fult virksemi er á heiminum, fara at starvast millum 10-15 starvsfólk samstundis, býtt út á tær ymisku eindirnar. Samanlagt verður væntað, at eini 30-35 starvsfólk fara at verða knýtt at heiminum. Sameining av starvsfólkunum er týdningarmikið fyri teirra trivnað, og verður tískil gjørd starvsfólkaeind, har hesi kunnu verða saman í matarsteðgi ella øðrum steðgi, har møguleiki er at hava eina samveru uttan um arbeiðið.


2.0. Skipan av byggimáli

2.1. Skipan undir skriving av byggiskrá

Arbeiðið at skriva byggiskránna hevur verið skipað soleiðis:



2.2. Skipan undir restini av verkætlanini



Verkætlanin verður boðin út í heildarráðgeving samb. útbjóðingarskrivi frá Landsverki.

3.0. Fortreytir

3.1. Lógargrundarlag

Henda byggiskrá verður nýtt sum grundarlag fyri verklagslóg.

3.2. Byggiøkið

Virkið:	**Adressa:**	**Matr. nr.:**	**Eigari av matr.:**	**Vídd á matr.:**	**Tillutað økið:** (markerað við gulum)
Hagalendi	Eirargarður	1000a	Føroya Landsstýri	107024 m^2	Støddáleið 4000 m^2



3.3. Atkomuvegir

Atkomuvegurin til byggingina skal verða frá Heygsvegnum.

3.4. Veðurlag

Økið er miðskeiðis í miðbýnum í Tórshavn og liggur ikki ábært fyri í mun til veður og vind.

3.5. Veitingar

Víst verður til www.kortal.fo, har verandi tøkniligu veitingarnar, vatn, kloakk og frárensl í økinum kunnu síggjast.

3.6. Lendisviðurskifti

Lendið er hagalendi. Áðrenn bygginging fer í gongd, skulu gerast kanningar av lendinum, sum vísa, hvussu undirlendið háttar seg.

3.7. Myndugleikakrøv

Byggingin skal fylgja almennu byggisamtyktini, umframt serstøku byggisamtyktini fyri økið.

Byggingin skal harafturat fylgja komandi føroysku bygningskunngerðini (byggireglugerðini) ella danska bygningsreglementet (BR10), um føroyska bygningskunngerðin ikki er komin í gildi. Aðrir viðkomandi faknormar og vegleiðingar fyri ávísu byggingina skulu somuleiðis fylgjast, herundir kunngerð nr. 13 um atkomuviðurskifti frá 10.02.2012 v/ fylgiskjølum.

Um bygningskunngerðin ikki er sett í gildi, so skal uttanhýsis ráðgevin avtala við byggimyndugleikan, hvussu krøvini verða lokin í mun til verandi brunareglur. Krav verður sett fram um, at brunaávarðingarskipan skal verða fyri bygningin, og at knýtt verður til brandstøðina í Tórshavn.

Uttanhýsis ráðgevin avgreiðir byggiloyvið, grundað á alment galdandi krøv og ynskir, sum eru lýst í byggiskránni. Í hesum sambandi skulu viðurskiftir við brunamyndugleikar, arbeiðseftirlitið, Heilsufrøðiligu Starvsstovuna, friðingarmyndugleikar o.o., ið hava ásetingar viðvíkjandi byggimálinum, eisini avgreiðast.

4.0. Krøv og ynskir til byggimálið

4.1. Krøv og ynskir til byggimálið

Aðalmálið fyri bú- og umlættingarheimið er at veita børnum og ungum við autismu góðar karmar soleiðis, at hesi kunnu stimbrast og trívast í heimligum umhvørvi. Heimið skal á ongan hátt líkist einum stovni, men heldur einum privatum heimi og skal tískil fella væl inn í umhvørvið.

Byggjast skal eitt heim, sum er umleið 900 m² og í einari hædd. Heimið skal býtast upp í fýra ymsar virkiseindir, nevniliga búeind, umlættingareind, virkniseind og starvsfólkaeind. Tað er av stórum týdningi, at einstøku eindirnar ikki órógva hvørja aðra, men heldur stuðla upp undir virksemið í hvørji einstøku eind. Heimið skal virka sum privat heim fyri búfólkini samstundis við, at heimið er opið fyri heimabúgvandi børnum og ungum við autismu, har hesi koma á virkniseindina at gagnnýta ymsu hentleikarnar, sum eindin hevur at bjóða.

Bú- og umlættingarheimið skal passa til umhvørvið í skapi, stødd, tilfari og liti. Dentur skal leggjast á, at rætta tilfarið, konstruktiónir og bygningsloysnir verða valdar í mun til haldføri og góðsku, soleiðis at viðlíkahaldið verður minimalt.

Ynski er, at bú- og umlættingareindin hava vanliga rúmhædd, at tað ikki er opið undir tróðrið, og at eingin innskotin hædd ella hemsur er. Ynski er somuleiðis, at felags rúm hava nógvar krókar og ikki eru stór fýrakantað rúm. Sí meiri um hetta undir pkt. 4.6, har einstøku rúmini eru nærri lýst.

4.2. Burðardygd

Bú- og umlættingarheimið skal byggjast og rekast soleiðis, at hugsað verður burðardygt. Veljast skal varandi orkuveiting og orkuvinarligar tøkniskipanir/ útbúnaður. Tilfarsvalið skal verða orkuvinarligt og burðardygt og skal í størstan mun leingja um livitíðina á bygningi.

Tilfarsval ísv. útiøki skal eisini hugsast burðardygt. Tilfarsvalið skal passa til føroysku náttúruna og veðurlagið.

4.3. Ljóðviðurskifti

Bygningurin skal staðsetast soleiðis á byggiøkið, at óljóð frá bilum o.l. verður avskermað og á ongan hátt órógvar inni í bygninginum. Somuleiðis skulu parkeringarviðurskiftini inni á byggiøkinum staðsetast soleiðis, at heldur ikki hesi geva óljóð frá sær inn í bygningin.

Tað er av stórum týdningi, at ljóðviðurskiftini kring bygningin og inni í bygninginum er nøktandi. Ljóðviðurskiftini skulu fylgja ásetingunum í DS490, Lydklassifikation af boliger. Byggjast skal sambært ljóðflokki A.

Projekttilfarið skal lýsa ljóðstøðið í ávísa rúminum og ljóðkrøv til bygningslutir ímillum rúm. Stór krøv skulu setast til útinning av ljóðtetting í byggitíðini.

4.4. Inniumhvørvið

Skipanir skulu tryggja, at hitin í rúmunum er hóskandi til virkisøkið í rúminum, og at stýringin kann gerast skynsamt.

Luftskiftisskipanir skulu tryggja góðskuna á inniluftini samb. galdandi ásetingunum. Fyrilit skal havast fyri, at skipanirnar eru einfaldar at stýra, bæði í mun til orku og virkisøki.

Val av tilfari skal tryggja, at góð luftgóðska er í rúmunum – tilfar skal í minst møguligan mun lata partiklar/damp frá sær.

Dentur skal leggjast á at fáa dagsljós inn í øll rúm, har krav er um tað. Virksemi í ymsum rúmum má ikki avmarkast vegna blendandi dagsljós. Hugsast skal um at tillaga ljósviðurskiftini eftir krøvum og ynskjum hjá borgarum. Autistar kunnu vera sera viðbreknir í mun til ljós.

4.5. Fólk við breki

Bú- og umlættingarheimið skal skipast soleiðis, at fólk við breki lættliga kunnu flyta seg runt í øllum bygninginum. Kravið er eisini galdandi fyri atkomu til bygningin; víst verður til kunngerð um atkomuviðurskifti.

4.6. Virksemi í bú- og umlættingarheiminum

Í "Fylgiskjal 01_Samband millum eindirnar" sæst, hvussu virkisøkini eru knýtt at hvørjum øðrum. Fylgiskjalið er gjørt fyri at lýsa, hvussu bygginevndin hugsar sær, at virkisøkini verða staðsett í mun til hvørt annað, og er ætlað at verða nýtt sum íblástur til loysn av verkætlanini.

Heitini í sær sjálvum lýsa virkisøkið, men verða krøv og ynski til virkisøkini lýst í eftirfylgjandi brotum.

4.6.1. Búeind

Búeindin er roknað til 6 borgarar. Búeindin skal skiljast sundur í eina privata eind við 6 íbúðum, felagsrúmi og inngongd. Millumgongd skal verða millum privatu eindina og felagsrúmið. Hvør íbúð skal hava sítt egna útiøki, har gongt er beinleiðis frá íbúð og út.

Hugsast skal um, at øll innrætting skal kunna verða skiftandi og ymisk. Íbúðirnar skulu byggjast soleiðis, at stova og kamar lættliga kunnu umskipast til størri ella smærri rúm. Møguleiki skal verða fyri at kunna seta innbúgv á ymsan hátt, tí borgararnir hava ymsan tørv. Hurðar frá felagsøki skulu latast upp inn í privata økið. Breidd á hurðum skal verða M9 og staðsettar soleiðis, at hesar lættliga kunnu skiftast til M10 og framhaldandi yvirhalda krøv um frástøðu millum vegg og hurð ísv. rørslutarnaði. Veggir í íbúðum skulu fyrireikast til, at uppsetast kunnu skinnarar til rúmdekkandi loftslyftu.

Íbúðir:
Íbúð skal innrættast við einum kamari, einari stovu og einum baðirúmi.

- Kamarið skal rúma eini einkultari song, einum songarborði og einum klædnaskápi.
  Kamar skal verða umleið 10 m².
- Stova skal rúma 2 mans-sofu, einum lenistóli, sofaborði, reol, arbeiðsborði og skriviborðstóli. Pláss skal verða fyri vegghongdum sjónvarpi. Inni í stovu skal verða net- og antennustikk. Frá stovu skal verða útgongd til privata úti-økið. Stova skal verða umleið 14 m².

- Baðirúm skal innrættast við vanligum hentleikum. Tó skal sanitetur staðsetast soleiðis, at bert við at skifta hendan út, kann baðirúmið nýtast av rørslutarnaðum borgarum, har krav frá BR10 um innrætting av vesi til rørslutarnað er yvirhildið. Spegl á vesi skal ikki innbyggjast í vegg og skal verða við herðaðum og lamineraðum glasi. Á baðirúmi skal verða minst 1 stk. el-stikk til barbermaskinu, fønara e.l. El- stikk skal eisini leggjast fram til hondvask (møguleiki fyri el-stýrdum vaski). Staðseting av brúsuøki skal liggja burtur frá innhurðini og við góðum halli móti brúsu-ristum. 2 stk gólvristir skulu verða í brúsuøkinum. Stødd á baðirúmi skal verða áleið 7 m².
- Útiøkið skal verða (í somu hædd/ájavnt við) út frá íbúð. Útiøkið skal verða við slættari álegging, umleið 4 m². Veggur skal verða ímillum øll útiøkini soleiðis, at einstøku íbúðirnar ikki síggja inn til hvørja aðra. Øll 6 útiøkini í búeindini skulu hava felags girðing.

Millumgongd:
Millumgongdin skal verða greiður skilnaður millum felagsrúmið og privatu eindina. Gongd má ikki verða smalri enn 1,5 m. Smalar gongdir kunnu elva til fysiskan tvídrátt. Gongdin má ikki verða long og einstáttað. Upp at gongdini skulu liggja rúm til náttarvakt, starvsfólkavesi og RT-baðirúm. Millumgongd skal verða áleið 18 m².

- Rúm til náttarvakt skal innrættast við einari sovisofu og sofaborði. Pláss skal gerast fyri vegghongdum sjónvarpi og skal hava net- og antennustikk. Tryggjast skal, at starvsfólk kann læsa rúmið av og rýma úr rúminum um tørvur verður á hesum. Stødd á rúmi umleið 12 m².
- Vesi til starvsfólk skal innrættast við vanligum saniteti umframt spegli. Vesi skal liggja í beinleiðis sambandi við rúm til náttarvakt. Stødd umleið 2 m².
- Baðirúm til rørslutarnaði skal lúka krøvum frá BR10 um innrætting av vesi til rørslutarnað. Baðirúmið skal innrættast við kummu, har kokustólur (bækkenstol) lættliga kann koma framat. Pláss skal gerast til stóra brúsu, har pláss er fyri brúsulegu og fríttstandandi el-stýrdum elevatiónsbaðikari. Vask skal verða el-stýrt, har hetta kann flytast upp og niður og síðuvís eftir skinnara. Hillar skulu setast á vegg til goymslu av ymsum toilettlutum. Baðirúmið má rúma í minsta lagi 1 brúkara og 2 starvsfólkum. Stødd á vesi skal verða umleið 14 m².

Felagsrúm:
Felagsrúm er uppihaldsrúm til borgararnar. Upp at felagsrúminum skal liggja felagskøkur og kovi/hjallur.

- Uppihaldsrúmið skal rúma felags máltíðum og sosialum felagsskapi. Rúmið skal tó innrættast við smærri básum og lesikrókum, soleiðis at borgarar eisini hava møguleika at sita einsamallir. Møguleiki skal verða fyri at býta uppihaldsrúmið í tvey við faldiveggi. Uppihaldsrúmið skal innrættast við spísiborði og stólum til 10 borgarar/starvsfólk øðrumegin faldiveggin og 3-manssofu og sofaborði hinumegin. Pláss skal verða fyri vegghongdum sjónvarpi. Uppihaldsrúmið skal verða áleið 40 m².
- Køkur skal innrættast við køkselementum, einum køksvaski og krana við tilhoyri, kókiplátu, bakarovni, høgum køliskápi, frystiskápi, mikroovni, uppvaskimaskinu og eimhettu. Hugsast skal um at leggja nóg nógv el-stikk í køkin til el-ketil, kaffimaskinu o.l. sum kann nøkta tørvin, tá skipað verður fyri størri tiltøkum. Hurð skal verða millum køk og uppihaldsrúm, har møguleiki er fyri at læsa hurðina. Køkur skal verða umleið 12 m².
- Kovi/hjallur skal liggja beint upp at køki, har gongt er inn í kova/hjall frá køki. Kovin skal innrættast við hillum til matargoymslu. Pláss skal verða fyri frystiboks, og el-stikk skal leggjast til hesa. Kovi skal verða umleið 12 m².

Inngongd:
Inngongdin er høvuðsinngongd til eindina. Inngongdin skal verða vard móti regni og vindi. Ynski er, at inngongdin liggur undir taki. Inn frá inngongdini liggja durur, klædnarúm og gongd.

- Durur skal verða nóg stórur til, at koyristólsbrúkarar kunnu møtast.
- Klædnarúm skal liggja upp at duri soleiðis, at borgarar í koyristóli kunnu koyra beinleiðis frá duri og inn í klædnarúm og haðanifrá inn í gongd. Pláss skal verða fyri skitnum og reinum rulistólum til borgarar at skifta

ímillum til ávikavist inni- og útivirksemi. Klædnarúm skal innrættast við 6 stk klædnaskápum til borgararnar. Pláss skal verða til jakkar, draktir, gummistilvar, skógvar o.l. Bonkur skal verða í garderobu. Pláss skal verða fyri, at starvsfólk kunnu lata borgarar í klæðir og skógvar. Stødd á klædnarúmi skal verða umleið 12 m².

- Gongd skal liggja upp at duri, klædnarúmi, millumgongd og felagsrúmi. Beinleiðis atgongd skal verða frá gongd og til nevndu rúm, umframt at atgongd skal verða til Virkniseindina. Eins og fyri millumgongd, skal gongd verða í minsta lagi 1,5 m breið.

4.6.2. Umlættingareind

Umlættingareindin er roknað til 6 borgarar. Eins og búeindin skal umlættingareindin skiljast sundur í eina privata eind við 6 íbúðum, felagsrúm og inngongd. Millumgongd skal verða millum privatu eindina og felagsrúmið. Hvør íbúð skal hava sítt egnað útiøki.

Hugsast skal um, at øll innrætting skal kunna verða skiftandi og ymisk. Møguleiki skal verða fyri at kunna seta innbúgv á ymsan hátt, tí borgararnir hava ymsan tørv. Hurðar frá felagsøki skulu latast upp inn í privata øki. Breidd á hurðum skal verða M9 og staðsettar soleiðis, at hesar lættliga kunnu skiftast til M10 og framhaldandi yvirhalda krøv um frástøðu millum vegg og hurð ísv. rørslutarnað. Veggir í íbúðum skulu fyrireikast til at uppsetast kunnu skinnarar til rúmdekkandi loftslyftu.

Íbúðir:
Íbúð skal innrættast við kamari og stovu, sum eru í sama rúmi, umframt einum baðirúm.

- Kamar/ stova skal rúma eini einkultari song, songarborði og klædnaskápi. Pláss skal verða fyri 2-mans-sofu, sofaborði, reol, arbeiðsborði og skriviborði. Pláss skal verða fyri vegghongdum sjónvarpi. Inni í kamari/stovu skal verða net- og antennustikk. Frá kamari/stovu skal verða útgongd til privata úti-økið. Kamar/ stova skal verða umleið 14 m².
- Baðirúm skal innrættast júst sum baðirúm í íbúðum í búeind.
- Útiøkið skal innrættast júst sum útiøki í íbúðum í búeind.

Millumgongd:
Krøv til millumgongd eru eins og í millumgongd í bú-eindini. Tó skal vaskirúm eisini staðsetast her.

- Vaskirúm skal innrættast við einari vaskimaskinu og einari turkitrumlu. Sokkul skal gerast undir hesum umleið 40 cm upp frá gólvinum. Arbeiðsborð við køksvaski skal verða fram við veggi. Undir og yvir borðplátu skulu hillar kunna setast upp á veggin til goymslu av m.a. tilfari til persónliga røkt o.l. Stødd umleið 10 m².

Felagsrúm:
Sí somu krøv sum fyri felagsrúm í búeind.

Inngongd:
Sí somu krøv sum fyri felagsrúm í búeind.

4.6.3. Virkniseind

Virkniseindin er roknað til frítíðartilboð til 16 brúkarar. Virkniseindin skal rúma frítíðartilboð fyri børn og ung, ið eru búsitandi á stovninum, eru til umlætting ella búgva heima. Frítíðartilboð er t.d. frítíðarskúli ella frítíðarklubbi um kvøldið.

Virkniseindin skal innrættast við felagsrúmi, køki/vásakøki, kova/hjalli, vaskirúmi, ítrivsrúmi v/goymslu, verkstaði, sansarúmi, venjingarrúmi v/goymslu, rúmi til vatnvirksemi, lesisali, tveimum vesum til rørslutarnað, goymslu til ymisk tól, høvuðsinngongd, duri, garderobu og gongd.

Felagsrúm:
Felagsrúm er tilhaldsrúm og kann skipast saman við felagsrúmi í umlættingareindini. Upp at felagsøki skal liggja køkur/vásakøkur og kovi/hjallur. Felagsøkið og ítrivsrúmið skulu eisini kunna skipast saman eftir tørvi.

- Tilhaldsrúmið skal rúma felags máltíðum og skal innrættast við spísiborði og stólum til 16 brúkarar. Tilhaldsrúmið skal eisini rúma smærri básum/krókum, har borgarar kunnu sita í einsemi og fordjúpa seg. Tilhaldsrúmið skal verða umleið 20 m².
- Køkur/vásakøkur skal innrættast sum vanligur køkur og sum vásakøkur í einum. Pláss skal verða fyri vanligum køkshentleikum so sum køkselementum, einum køksvaski og krana við tilhoyri: Kókiplátu, bakarovni, høgum køliskápi, frystiskápi, mikroovni, uppvaskimaskinu og eymhettu. Hugsast skal um, at leggja nóg nógv el-stikk í køkin til el-ketil, kaffimaskinu o.l., sum kann nøkta tørvin, tá ið skipað verður fyri størri tiltøkum. Vásakøkur kann verða skildur frá køkinum við veggi, men er sama rúm. Vásakøkurin er til reingerð av m.a. fiski, eplum o.l., sum borgararnir hava tikið við sær heim útifrá. Vásakøkurin skal innrættast við reingerðarvaski, spulikrana og borðplátu. Gólvrist skal verða tætt við vaskið. Hurð skal verða millum køk/vásakøk og tilhaldsrúm, har møguleiki er fyri at læsa hurðina. Køkur/vásakøkur skal verða umleið 15 m².
- Kovi/hjallur skal liggja beint upp at køki, har gongt er inn í kova/hjall frá køki. Kovin skal innrættast við hillum til matargoymslu. Pláss skal verða fyri frystiboks, og el-stikk skal leggjast til hesa. Kovi skal verða umleið 12 m².

Vaskirúm:
Vaskirúm skal innrættast við einari vaskimaskinu og einari turkitrumlu. Sokkul skal gerast undir hesum, umleið 40 cm upp frá gólvinum. Arbeiðsborð við køksvaski skal verða fram við veggi. Undir og yvir borðplátu skulu hillar kunna setast upp á veggin til goymslu av m.a. tilfari til persónliga røkt o.l. Støddumleið 10 m².

Ítrivsrúm og goymsla:
Ítrivsrúm skal kunna býtast upp í smærri básar og hava góðar møguleikar fyri avskermingum. Rúmið skal nýtast til handaligt ítriv av ymsum slagi, so sum máling, tekning, perling, klipping o.l. Umframt skal rúmið hava ein lesikrók, har borgarar kunnu sita í friði og náðum og lesa. Rúmið skal innrættast við borði og stólum til 8 fólk og skápum, sum kunnu læsast, til goymslu av ítrivstingum. Støddá rúmi skal verða umleið 20 m².
Goymslurúm skal staðsetast upp at ítrivsrúmi. Goymsla skal verða minst 10 m².

Verkstaður:
Verkstaður skal nýtast til grovari ítriv og virksemi so sum snikkaraarbeiði, Rúmið skal innrættast við einum snikkarabonki, arbeiðsborði og skápum, sum kunnu læsast, til goymslu av amboðum, seymi og øðrum tilhoyri. Pláss skal gerast fyri goymslu av plátutilfari, og hugsast skal um, hvussu tilfarið sleppur inn í rúmið. Egnað punktútsúgving skal verða yvir arbeiðsborði. Støddá rúmi skal verða umleið 15 m².

Sansarúm:
Sansarúm er rúm, sum skal stimbra hoyri- og følisans hjá borgarum. Rúmið skal innrættast soleiðis, at el-koyristólar lættliga kunnu flytast runt í rúminum.

Rúmið skal rúma eini dupultari vatnsong og massasjustóli. Pláss skal gerast fyri ljóðútgerð og hátalarum á veggi. Ljóðkelda skal eisini hugsast inn undir vatnsong soleiðis, at ljóðið ger rørslur í vatnsongina. Pláss skal somuleiðis gerast til ymsar ljóskeldur, m.a. í loftinum, í veggum og á gólvinum. Pláss skal gerast til uppvørpu undir loftinum sum kann vísa á slættan hvítan vegg. Á veggi skal verða pláss fyri stórum spegli. Rúmið skal kunna myrkaleggjast, krav er ikki til dagsljós. Stødd á rúmi umleið 12 m².

Venjingarrúmi og goymslurúm:
Rúmið skal nýtast til kropsligar venjingar av ymsum slagi umframt til "buldrirúm". Rúmið skal tola stoyt og harða viðferð uttan at taka skaða av hesum. Pláss skal gerast fyri lofthongdari heingikoyggju, "hesti" og reiggju. Á veggir skulu heingjast veggja-rimar. Eisini skal gerast pláss á veggjum til at heingja spegl upp. Annað leyst innbúgv til fimleik sum t.d. reiðskapsamboð skulu hugsast inn í rúmið. Goymslurúm til amboð skal leggjast upp at venjingarrúmi. M10 hurð skal setast ímillum rúmini. Stødd á venjingar- og goymslurúmi skal verða umleið 30 m².

Rúm til vatnvirksemi:
Alt rúmið skal vátrúmstryggjast umframt at møgulig serkrøv til rúmið skulu yvirhaldast. Brúkið svarar til svimjihøll við umklæðingarrúmi og hitarúmi. Rúmið skal býtast sundur í fýra, ávikavist til vatnvirksemi, hitakliva, brúsurúm og RT-vesi. Rúmdekkandi skinnaraskipan skal verða í rúminum.

- Pláss til vatnvirksemi skal verða egnað sum vátrúm við høgum vatn-belastningi, har borgarar kunnu sleppa at sprutta við vatni og stuttleika sær. Rúmið skal rúma 1 stk gosbað til umleið 4-5 borgarar. Gosbaðið skal innbyggjast í gólv um neyðugt. Krav er, at kantur upp í gosbaðið ikki má verða hægri enn 40-50 cm upp frá gólvinum. Gott pláss skal verða framman fyri gosbaðið til at fáa rørslutarnaðar borgarar úr stóli og í gosbaðið.
- Pláss til hitakliva skal verða egnað til hitakliva við infrareyðum ljósi til umleið 4-5 borgarar. Val av hitakliva setur krøv til, um hesin má standa í serstøkum rúmi ella ikki. Pláss skal gerast framman fyri hitakliva til at fáa rørslutarnaðar borgarar úr stóli og inn í hitaklivan.
- Pláss til umklæðing og brúsu. Pláss skal gerast fyri umklæðingarbonki til 4-5 borgarar (gentur og dreingir eru ikki samstundis í vatnvirksemisrúminum). Brúsuøkið skal verða við tveimum føstum brúsum og einari hondbrúsu. Pláss skal verða í brúsuøkinum fyri einari mobilari brúsulegu.
- RT-vesi er serstakt rúm við øllum hentleikum. RT-vesi skal hava beinleiðis hurð inn til brúsu/ umklæðing.

Rúmið skal liggja upp at Venjingarrúmi og Sansarúmi. Stødd á rúmi umleið 20 m².

Lesisalur:
Týdningarmikið er, at friður er í rúminum til at fordjúpa seg og lesa. Rúmið skal verða skilt frá øðrum rúmum soleiðis, at ljóð á ongan hátt órógvar borgarar, sum nýta hetta høli.
Rúmið skal innrættast við stólum og borði til 8 fólk. Pláss skal eisini verða fyri 1-2 bleytum sekkjastólum. Hillar til bøkur o.l. skulu kunna heingjast upp á vegg. Stødd á lesisali skal verða umleið 12 m².

2 stk vesi til rørslutarnaði:
Vesi til rørslutarnað skal innrættast vil øllum hentleikum. Stødd umleið 7 m² til hvørt vesi. Krav frá BR10 um innrætting av vesi til rørslutarnað skal fylgjast.

Goymsla til ymisk tól:
Goymslan er til hjálpartól og eykaútgerð. Tað er týdningarmikið, at goymslan er væl virkandi, og at tól lættliga kunnu takast út úr goymsluni og setast á pláss aftur, uttan órógv frá øðrum tólum á goymsluni.
Stødd á goymslu skal verða umleið 24 m².

Høvuðsinngongd:
Inngongdin er høvuðsinngongd til Virkniseindina og til heimið. Sostatt skal høvuðsatkoman, parkeringarbásar, ruskrúm og goymslurúm staðsetast tætt við hesa inngongd. Inngongdin skal verða vard móti regni og vindi. Ynski er, at inngongdin liggur undir taki, sí meiri um hetta í pkt. 7.3. Inn frá inngongdini liggja durur, klædnarúm og gongd.

- Durur skal verða nóg stórur til, at koyristólsbrúkarar kunnu møtast.
- Klædnarúm skal liggja upp at høvuðsinngongd, soleiðis at borgarar í koyristóli kunnu koyra beinleiðis frá inngongd og inn í klædnarúm. Pláss skal verða fyri skitnum og reinum koyristólum til borgarar at skifta ímillum til ávikavist inni- og útivirksemi. Klædnarúm skal innrættast við 10 stk klædnaskápum til borgararnar. Pláss skal verða til jakkar, draktir, gummistilvar, skógvar, o.l. Bonkur skal verða í klædnarúmi. Pláss skal verða fyri, at starvsfólk kunnu lata borgarar í klæðir og skógvar. Stødd á klædnarúmi skal verða umleið 18 m².
- Gongd skal liggja upp at duri, klædnarúmi og felagsrúmi, og beinleiðis atgongd skal verða frá gongd og til nevndu rúm. Gongd skal verða í minsta lagi 1,5 m breið.

4.6.4. Starvsfólkaeind

Starvsfólkaeindin er roknað til ta virksemið, sum leiðarin o.l. hevur á heiminum. Somuleiðis er eindin staðið, har starvsfólk kunnu taka eina fríløtu saman við øðrum starvsfólki á heiminum. Starvsfólkaeindin skal rúma eini leiðaraskrivstovu, skrivstovu til starvsfólk, fundarhøli, starvsfólkarúmi, baðirúmi/umklæðing til starvsfólk umframt reingerðarrúmi og húsavarðarúmi. Eisini verður tøkni- og ventilatiónsrúm lagt í starvsfólkaeindina. Starvsfólkaeindin hevur sína egnu inngongd.

Leiðaraskrivstova:
Leiðaraskrivstovan skal innrættast við einum skriviborði, skrivstovustóli, einari tvey-mans sofu og lítlum sofaborði. Pláss skal gerast fyri reol-veggi. Innleggjast skal net-stikk. Stødd á rúmi umleið 12 m².

Skrivstova til starvsfólk:
Skrivstovan er roknað til arbeiðsfólk at skráseta dagsins hendingar v.m. Skrivstovan er ikki fast arbeiðspláss, men meiri eitt rúm til nevnda virksemið. Rúmið skal innrættast við einum standi-arbeiðsborði og høgum stóli. Eisini skal innrættast við reol, sum kann læsast. Innleggjast skal net-stikk. Stødd á rúmi 12 m².

Fundarhøli:
Rúmið skal innrættast við fundarborði og stólum til 10 fólk. Á vegg skal gerast pláss til at heingja sjónvarp e.l. Innleggjast skal net-stikk. Stødd á rúmi skal verða umleið 15 m².

Starvsfólkarúm:
Rúmið er til starvsfólk at savnast saman í, tá fríløtur eru. Rúmið skal innrættast við spísiborði og stólum til 6 fólk. Innrættast skal við umleið 3 stk køkselementum, borðplátu við innbygdum vaski og krana. Minst 2 el-stikk skulu verða við borðplátuna til el-ketil, kaffimaskinu o.l. Rúmið skal innrættast við uppvaskimaskinu til 6 fólk, køliskápi og mikroovni. Stødd á rúmi umleið 15 m².

Baðirúm/umklæðing:
Baðirúm skal innrættast við vanligum hentleikum. Umklæðing skal leggjast uppat baðirúmi og skal innrættast við 20 stk klædnaskápum og beinki. Klædnaskáp skulu kunna læsast. Stødd á rúmi skal verða umleið 10 m².

Reingerðarrúm:
Reingerðarrúm er rúm til vaskivogn og goymslu av sápu, wc-pappíri v.m. Í reingerðarrúmi skal verða reingerðarvask og spulikrani. Á vegg skulu hillar setast upp til goymslu av áðurnevndu. Stødd á rúmi skal verða 20 m².

Húsavarðarúm:
Rúmið er arbeiðsrúm hjá húsavørði og goymsla av ymsum tilfari. Rúmið skal innrættast við standi-arbeiðsborði. Á vegg skulu uppsetast hillar til amboð og goymslu. Stødd á rúmi skal verða umleið 12 m².

Tøknirúm:
Tøknirúm skal staðsetast skilabest í starvsfólkaeindini. Møguleiki er fyri at sameina tøknirúm við húsavarðarúm. Støddin er tengt at útgerðini í rúminum.

Ventilatiónsrúm:
Ventilatiónsrúm skal staðsetast skilabest í starvsfólkaeindini. Støddin er tengt at útgerðini í rúminum.

Inngongd:
Starvsfólk hava sína egnu inngongd. Upp at inngongd skal liggja baðirúm/umklæðing. Inngongdin skal verða vard móti regni og vindi. Ynski er, at inngongdin liggur undir taki.

4.6.5. Úthús

Upp at høvuðsinngongdini til Virkniseindina skal ruskrúm og goymslurúm staðsetast.

Ruskrúm:
Ruskrúm skal staðsetast tætt við køkin í Virkniseindini, og góð gøta við álegging skal verða frá køki og beinleiðis út til ruskrúmið. Ruskrúmið skal í stødd svara til, at burturkastbingjur til ávikavist húsarhaldsburturkast og endurnýtslupappír og papp lættliga kunnu rúmast í rúminum. Staðseting, útlufting, innrætting o.l. umstøður av ruskrúmi skulu fylgja krøvum, ið Tórshavnar kommunu hevur á økinum. Ljós skal leggjast í goymslurúmið umframt frárenning í gólvið. Ruskrúm skal kunna læsast av.

Goymslurúm:
Goymslurúm skal nýtast til goymslu av ymsum uttandura leikum og súkklum. Goymslurúmið skal verða turt og væl ventilerað. Ljós skal leggjast í goymslurúmið umframt frárenning í gólvið. Goymslurúmið skal innrættast við hillum á veggi. Goymslurúm skal kunna læsast av.

5.0. Skipan av byggiøkinum

Bú- og umlættingarheimið skal skipast við einari høvuðsinngongd inn til virkniseindina og inngongdum inn til bú-, umlættingar-, og starvsfólkaeindina. Koyristólar skulu kunna koma fram til allar inngongdir.

Ein partur av økinum skal varðveitast sum "grønt øki". Hetta merkir, at økið skal verða óslætt, nakað sum hagalendi. Víddin av økinum er tengd at staðsetingini av bygninginum, atkomuni og uttandura virksemi. Uttandura virksemi er ból, reiggjur, pláss til harðligt spæl o.l.

5.1. Lendið

Økið, har bygt verður á, er hagalendi.
Lendið skal kannast, drenast og viðgerast samb. galdandi krøvum. Uppfylling og steinseting skal m.a. tryggja, at væta á ongan hátt treingir inn í bygningin frá undirlendinum.

Við allar inngongdir, har gólvhædd er áraka lendishædd (niveaufrítt), skal rist e.l. leggjast, so eisini her kann tryggjast gott hall út frá bygningi samstundis við, at krav um atkomuviðurskifti vera hildin.

5.2. Økið uttanum

Uttanumsøkið skal innrættast eftir ásetingunum um atkomuviðurskiftir fyri fólk við rørslutarni. Framman fyri høvuðsinngongd skal álegging verða asfalt. Vitjandi skulu kunna ganga skógvarnar turrar, áðrenn komið verður inn til høvuðsdyrnar.

Uttanumsøkið skal skipast soleiðis, at góðir møguleikar vera hjá borgarum at uppihalda seg úti. Nógvir krókar við lívd skulu virka sansamennandi fyri borgarar. Hetta kann gerast m.a. við planting sum verja móti vindi. Plantusløg skulu veljast, sum eru harðbal í mun til veðrið.

5.3. Atkomuvegir

Bert ein atkoma skal verða inn á økið, og skal hendan verða inn frá Heygsvegnum. Atkomuvegur skal verða við gonguteigi í aðrari síðuni. Viðkomandi reglugerð er galdandi. Atkoman skal verða asfalterað.

Atkoman til bygningin skal skipast soleiðis, at bussur kann koyra til høvuðsdyr at seta koyristólsbrúkarar av. Brandbilar, sjúkrabilar o.s.fr. skulu hava góðar atkomumøguleikar og skulu sleppa heilt til dyrnar. Serstøku krøvini til atkomumøguleikar hjá tilbúgvingini skulu fylgjast. Vøru-innkoyring, ruskbilar, o.l. bilar skulu somuleiðis hava pláss til at koyra til høvuðsdyrnar, at seta vøru av ella heinta rusk. Skipað ruskrúm skal verða leyst frá byggingini tætt við høvuðsinngongdina.

5.4. Parkering

Parkeringarpláss skal gerast sambært galdandi byggisamtykt fyri økið.
Upp at høvuðsinngongd skal liggja parkeringarpláss. Parkeringarsøkið skal skipast soleiðis, at óljóð frá bilum o.l. verður avskermað og á ongan hátt órógvar inni í bygninginum.

Parkeringsøki skal gerast til umleið 18 bilbásar, ella tað sum svarar til 1 bilbás pr. 50 m^2 húsavídd, harav 4 básar skulu verða til fólk við rørslutarni. Parkeringarøkið skal gerast sambært viðkomandi krøvum og normum og sambært galdandi byggisamtykt fyri økið. Parkeringarøkið skal verða asfalterað.

5.5. Staðseting av bygningi á økið

Bú- og umlættingarheimið skal staðsetast á byggiøkið soleiðis, at hetta liggur skilabest í mun til atkomu, parkering og tað virksemið, sum heimið bjóðar heimabúgvandi borgarum ísv. dagtilboð á virkniseindini. Somuleiðis er sera týdningarmikið, at borgarar í búeindini føla seg at koma inn á eitt privat øki, har teirra heim liggur fjálgt og friðarligt í heimligum umhvørvi. Pláss skal verða fyri uttandura virksemi, har hetta liggur vart frá almennari fólkaferðslu e.l.

Heimið skal eisini staðsetast soleiðis, at pláss er á byggiøkinum at útbyggja heimið. Pláss skal gerast kring virkniseindina soleiðis, at møguleiki er fyri at íbinda bú- ella umlættingareindir. Meiri útgreinaðir útbyggingarmøguleikar skulu avtalast við bygginevndina undir prosjektering.

Hædd skal takast fyri veðuri og vindi soleiðis, at bygningurin er vardur á bestan hátt og liggur sum verja fyri fólki, sum skulu nýta hendan. Ansast skal eftir, at beinleiðis sólarljós ikki órógvar innandura virksemi.

6.0. Tøkni og veitingar

Skipanir/útbúnaður/stýringar skulu lýsast og veljast í mun til livitíð, viðlíkahald, burðardygd og heildarkostnað, eisini við atliti at orkunýtslu. Harumframt skulu skipanirnar/útbúnaðurin setast soleiðis, at rakstur og viðlíkahald kann gerast á nøktandi hátt.

Niðan fyri nevndu skipanir/útbúnaður skal lúka nevndu krøv, umframt at fylgja viðkomandi faknormum.

6.1. Veitingar (til bygningin)

Allar veitingar, so sum el, vatn, tele, kloakk, eru í økinum, og skal bygningurin knýtast at verandi veitingum. Kannast skal, um verandi veitingar eru nøktandi til virksemið í bygninginum og skulu tillagast eftir tørvi.

Skipanir skulu fyrireikast og gerast, so at bygningurin er so orkuvinaligur sum til ber í mun til upphiting og rakstur.

Bindast skal í verandi kloakkskipan og vatnveiting í økinum sambært krøvum frá Tórshavnar kommunu. Tele - og netskipan skal leggjast inn í bygningin.

Útgreinað krøv til veitingarnar eru partur av framhaldandi arbeiðinum og verða at skjalfesta sambært viðkomandi faknormum.

6.2. Innleggingar (í bygninginum)

Allar innleggingar skulu prosjekterast við støði í galdandi normum og standardum.
Bindast skal í verandi skipanir í økinum sambært krøvum frá Tórshavnar kommunu.
Innleggingar skulu skipast soleiðis, at neyðug røkt av skipanum kann gerast á fullgóðan hátt.
Innleggingar skulu í størst møguligan mun leggjast soleiðis til rættis, at innrætting, rakstur og viðlíkahald gevur minst møguligt órógv fyri virksemi og brúkarar í húsinum, harumframt skal øll útgerð í størst møguligan mun verða orkuvinalig.

Innleggingar til bygningin eru m.a.:
Hiti, vatn, kloakk og el.

Hiti: Skipanir skulu fyrireikast og gerast, soleiðis at minst møgulig orka verður brúkt til upphiting og rakstur av bygninginum. Bygningurin skal hitast upp við varandi orkukeldu ella fjarhita. Val av oljufýring er ikki ein møguleiki. Bygningurin skal hitast upp við gólvhita.

Hitaskipanin skal skipast við uppdeiling og stýringum, ið tryggja skynsama upphiting av bygninginum í mun til veður, virksemi o.a.

Vatn: Drekkivatnsskipanir skulu skipast soleiðis, at krøv til drekkivatn altíð eru rokkin, og at tryggjað er ímóti tæring í skipanini. Partar av vatnskipanini, ið ikki brúka vatn vanliga, t.d. brandskáp, spulikranar og tílíkt, skulu verða íbundin á ein hátt, at krøv til drekkivatnsgóðskuna støðugt eru rokkin fyri aðrar skipanir.

Serstøk krøv til vatn:
Uttandura krani skal staðsetast við høvuðsinngongd. Spulibrunnar skulu setast í lendi kring bygningin eftir tørvi.

Frárenningar: Frárenningar í bygninginum skulu skipast í størst møguligan mun soleiðis, at tørvur ikki er at pumpa frárenningar. Verður neyðugt við pumpum, skulu tær staðsetast uttan fyri bygningin.

Serstøk krøv til frárenningar:
Baðirúm í íbúðum skulu verða við tveimum gólvfrárenningum í brúsuøkinum.

El: El skipanin skal nøkta allar skipanir í mun til virksemi í bygninginum. El skipanir skulu tillagast virkseminum við atliti at fleksibiliteti í mun til framtíðar rakstur og røkt á best møguligan hátt.

Føringarvegir: Allir føringarvegir skulu leggjast til rættis, soleiðis at innleggingar eru væl skipaðar og ruddiligar og lætt atkomuligar fyri broytingum og útbyggingum.

Innleggingarbakkar skulu taka atlit at ymisku skipanunum, soleiðis at tær eru skipaðar hvør sær á skynsaman hátt. Føringarvegir skulu brunatryggjast í mun til brunaflokkar.

6.3. Luftskifti

Luftskiftisskipanir skulu prosjekterast við støði í galdandi normum og standardum.

Luftskiftisskipanin skal skipast við uppdeiling og stýringum, ið tryggja skynsamt luftskifti í bygninginum í mun til veður, virksemi o.a.

6.4. Ljós

Serlig atlit skulu takast til ljósið. Borgarar við autismu kunnu vera sera viðbreknir um náttúrligt ljós og ljósútbúnað. Val av glasfeltum og ljósútbúnaður skal gerast í tøttum samstarvi við bygginevnd og Autismufelagið, so rætta loysn verður vald.

6.5. Tele- og net

Tele - og netskipan skal leggjast inn í bygningin.

Tráðleyst samband skal verða í øllum bygninginum, umframt fast samband, ið eisini skal í hóskandi mun verða í arbeiðsrúmum.

7.0. Krøv og ynski til bygningslutir

Allir bygningslutir skulu gerast, samansetast/byggjast og nýtast sum fyriskrivað í tilhoyrandi reglum, krøvum, vegleiðingum og normum. Útgreinað krøv til bygningslutir er partur av framhaldandi prosjekteringararbeiðinum og skulu skjalfestast sambært viðkomandi faknormum.

Val av tilfari skal verða við høgari góðsku í mun til haldføri og ellisdæmi. Bygningslutirnir hvør sær skulu hava langa livitíð og gerast soleiðis, at viðlíkahaldið er so avmarkað, sum til ber. Niðanfyri eru nakrir bygningslutir nevndir:

Vátrúm, so sum høli til reingerð, vesirúm, køkur o.l, skulu vátrúmstryggjast.

7.1. Konstruktiónir

Konstruktiónirnar skulu dimensionerast og eftirvísast sambært galdandi faknormum við tilhoyrandi donskum "anneksum". Val av konstruktiónum skal verða kent og tryggja skynsaman byggihátt.

Atlit skulu sýnast at føroyska veðurlagnum, og skulu konstruktiónirnar dimensionerast til eina vindlast svarandi til 55 m/s. Konstruktiónirnar skulu verða haldgóðar í mun til regn, kava og vind.

Berandi konstruktiónir skulu fyrireikast og gerast við atliti at størst møguligum fleksibiliteti.
Berandi betongveggir verða tí bert nýttir í tann mun, hetta er neyðugt fyri ta berandi skipanina og heildarstøðufestið.
Konstruktiónir, sum eru úr betong og standa berar, skulu dustbindast.

7.2. Framsíður

Val av tilfari og bygningslutum í framsíðunum skal fremjast við atliti at kendum og haldførum tilfari og bygningsloysnum. Hædd skal takast fyri, at útsjónd passar til umhvørvið og at bygningssniðið er tilpassað veðrinum (sól, regni og vindi) soleiðis, at bygningurin bæði kann gagnnýta og samstundis verjast móti náttúrukreftum.

Ynski er, at lættir útveggir verða bygdir við vindsperru úr plátutilfari. Ynski er, at klimaskermurin er liðugtmálað timburklæðing.

7.3. Tekja

Tekja skal byggjast úr dygdargóðum tilfari, egnað til føroyska veðurlagið. Takformur skal verða einfaldur og við góðum kendum loysnum. Ynskiligt er, at tekja skal byggjast við halli, har tilfarsval og hall passa væl til føroysk viðurskifti.

Útirúm frá íbúðum í bú- og umlættingarrúmum skulu verða undir takið, so mikið, at borgarar kunnu standa úti uttan at gerast vátir. Somuleiðis skal yvir høvuðsinngongd verða tak. Hugsast skal um, at bilur, ið setur fólki við rørslutarni av framman fyri høvuðsinngongd, kann bakka inn undir takið og seta fólk av, uttan at hesi gerast vát.

7.4. Vindeygu og størri glasumráðir

Val av vindeygum og evt. glasumráðum skal passa til føroyska veðurlagið og verða staðsett skilagott í mun til veður og vind. Hugsast eigur um haldføri og viðlíkahald, soleiðis at livitíðin gerst long. Somuleiðis eigur at hugsast um inniklima og sólávirkan inn í bygningin, bæði ísv. ljós og hita. Ávísir borgarar eru sera følsamir yvir fyri ljós og ovurupphiting, so tískil má fyrilit takast fyri hesum.

Ynski er ikki at hava síðuhongd vindeygu. Tó kunnu hesi nýtast í støðum, har vindur á ongan hátt forðar fyri, at vindeygu kunnu standa frítt opin. Vindeygu í øllum íbúðum skulu verða við innbygdum fjarstýrdum persiennum.

7.5. Skilaveggir

Skilaveggir og glasumráðir skulu lúka styrkis-, ljóð- og brunakrøv. Skilaveggir skulu verða lættir og skulu kunna setast upp og takast niður eftir tørvi, uttan at tað ávirkar berandi konstruktiónina. Skilaveggir skulu gerast úr tilfari við neyðugari styrki at bera veggjahongd innbúgv og útbúnað og skulu fyrireikast til hetta.
Krav verður sett til at allir veggir. At út- og innveggir eru klæddir við hørðum gipsplátum ella øðrum tilfari við tilsvarandi yvirflatustyrki. Hornaverja skal setast á øll útvendandi horn.

Møguleiki skal verða fyri at seta upp skinnarar á veggir til rúmdekkandi skinnaraskipan, har samlaða lastin er upp til 250 kg (mærkelast). Innbyggjast skal timburbelti í loftskinnarahædd í øllum rúmum ísv. hetta arbeiðið.

Gjøgnumføringar í skilaveggjum skulu ljóð- og brunatettast. Gjøgnumføringar skulu í mest møguligan mun leggjast inn frá felagsøkjunum.

Har valt verður innandura glasumráðir, skal glas verða herdað og laminerað trygdarglas. Sjónlig merking skal setast á glasumráðir, sum ger glasveggin sjónligan.

Í Virkniseindini skal rútur setast í innvegg millum felagsøkir og rúmini: Verkstaður, Sansarúm, Venjingarrúm og Lesisalur soleiðis, at starvsfólk kunnu hyggja inn í rúmini uttan at órógva borgararnar. Rútur skal staðsetast í eygnahædd og verða umleið 0,1 m². Rútur skal ljóðdoyva eins og veggur, og nevndu krøv til glasumráðir skulu yvirhaldast.

Í vátrúmum skulu serlig fyrilit havast fyri tættleikanum í øllum rúminum, eisini har ymiskt tilfar verður bygt saman, so sum millum vegg og gólv og í hornum. Á øll vesir skulu veggir fórast við vinyl í vátsonum. Á vesum í íbúðum skulu allir veggir verða fóraðir við vinyl. Rúm til vatnvirksemi skal útinnast eftir krøvum fyri svimjihøllir.

Skilaveggir, sum eru úr betong og standa berir, skulu dustbindast og tryggja góða ljóðgóðsku.

7.6. Gólv

Gólv skal verða úr slitsterkum og viðlíkahaldsløttum tilfari. Tilfarsvalið skal taka atlit at, at umhvørvið skal verða heimligt, heitt og innbjóðandi og at borgarar ferðast inn á leistum ella í koyristóli.
Tað er av sera stórum týdningi, at litir á gólvi og lit-skifti millum ymsu gólvini verða vald eftir tørvinum hjá borgarum. Gólváleggingin skal verða “rólig”, men ikki einslitt. Gólválegging inni í felagsrúmi og í opnum sambandi við onnur rúm má ikki skifta lit ella eyðkenni. Hetta kann órógva ávísar borgarar. Gólváleggingin í íbúðum í búeindini skal ganga undir lætta skilaveggin millum stovu og kamar.

Høvuðsinngongdin skal hava flísaálegging, ið hóskar til gólvhita, umframt máttur sum tryggja, at vátir og skitnir skógvar og koyristólar verða turrir/reinir. Gólválegging á vesum skal verða gliðtrygt vinyl.

7.7. Loft

Loftini skulu gerast og fyrireikast soleiðis, at innleggingar goymast. Loftini skulu tryggja góð ljóðviðurskifti, umframt at verða løtt at halda rein. Um træbetong-loft verða nýtt, skulu hesi verða málaði.
Niðurhongd loft skulu kunna takast niður á hóskandi støðum, so tað slepst til tøkniligar innleggingar alla staðni, har tað er neyðugt, og uttan at loftini farast av hesum.

Á baðirúmum skulu loft tola sera nógva vætu. Loft skulu kunna reingerast og málast eftir tørvi.
Um ber betongloft verða, so skulu hesi verða dustbundin og tryggja góða ljóðgóðsku.

7.8. Út- og innhurðar

Høvuðsúthurðar skulu verða úr góðari góðsku, egnaðar til føroyska veðurlagið og verða “niveau”-fríar. Høvuðshurðar skulu verða slitsterkar og harðførar við góðari gátt. Høvuðshurð skal verða vard undir taki. Høvuðsúthurðar skulu verða M10. Frá íbúðum í bú- og umlættingareindum skal terassuhurð setast í og ikki vanlig úthurð. Terassuhurð skal hava handtak á útsíðuni, men skal ikki kunna læsast uttanífrá. Terassuhurðar skulu ikki brúkast sum rýmingarleið og nýtast ikki at uppfylla brunakrøv til hurð í rýmingarleið.
Allar útgangandi úthurðar skulu hava fastan vegg ella aðra verju bak hurðini, sum skal virka sum hurðastoppari.

Innhurðar skulu verða úr góðari góðsku og egnaðar til nógv lastað brúk, svarandi til skúlabrúk. Innhurðar skulu verða vanligar hurðar og ikki skjótihurðar. Innhurðar skulu verða í minsta lagi M9. Hurðar skulu staðsetast soleiðis, at hesar lættligar kunnu skiftast út til M10 hurðar, við bert at flyta stólpan bak hurðina. Hurðar skulu staðsetast í mun til veggir o.l. sambært krøvum um plásstørv hjá fólki í koyristóli. Sí kunngerð nr. 13 frá 10.02.2012 um atkomuviðurskifti. Hurðar inn til baðirúm skulu verða vátrúmshurðar.

Hurðar inn til íbúðir í bú- og umlættingareindini skulu kunna avlæsast og borgarar hava sín egna lykil til sína egnu íbúð. Lyklaskipan skal gerast fyri heimið í samsvar við brúkaran.

8.0. Krøv og ynski til innbúgv og útbúnað

8.1. Innbúgv og útbúnaður

Leyst innbúgv og útbúnaður, sum er nevnt í byggiskránni, er ikki partur av verkætlanini, men innrættast skal eftir hesum soleiðis, at pláss er tøkt. Somuleiðis skulu innleggingar v.m. tillagast innrættingini.

Allar niðan fyri nevndu veitingar skulu íroknast verkætlanina.

Fast innbúgv:
Alt fast innbúgv skal íroknast verkætlanini. Hetta er fylgjandi:

- Køkselementir íroknað borðplátu til køkar í búeind, umlætting, virknisdeild og starvsfólkadeild. Køkar skulu verða úr slitsterkum tilfari, høgari góðsku og við Softlock hongslum.
- Borðpláta til vaskirúm úr slitsterkum tilfari.

Hvítvørur:
Allar nevndu hvítvørur skulu íroknast verkætlanini.

- Kókipláta, bakarovnur, høgt køliskáp, frystiskáp, mikroovnur, uppvaskimaskina og eimhetta til allar køkar.
- Frystiboksir til kovar.
- Vaskimaskinur og turkitrumlur til bæði vaskirúmini.

Sanitetur:
Niðan fyri nevndi sanitetur skal íroknast verkætlanini:

Vesir og brúsurúm:

- Vesikummur skulu verða festar til gólv við nøktandi fjarstøðu til vegg
- Hondvøsk skulu verða vegghongd
- Kranar til øll høndvøsk skulu verða við “sensori”.
- Brúsuhøvd inni á vesum í íbúðum skulu hanga undan loftinum, og har vatntilføringin frá blandingartóli til brúsuhøvd er innbygd í vegg.

RT-vesi:

- Vesikummur skulu verða festar til gólv við nøktandi fjarstøðu til vegg
- brúsulega sum Presalitt seria 2000, vegghongd
- Vask skal verða el-stýrt, har hetta kann flytast upp og niður og til síðuna eftir skinnara á veggi. Kranar til øll høndvøsk skulu verða við “sensori”.
- Blandingsbattarí á vegg við hondbrúsu, staðsett við brúsuleguna.
-

Køkar og vásakøkur:

- Køksvask skulu verða undirlímað í borðplátu. Køksvask skulu verða við bakka.
- Reingerðarvask skal veitast til vásakøk. Reingerðarvask skal verða undirlímað í borðplátu.
- Køkskranar skulu verða við “sensori”.
- Spulikrani skal veitast til vásakøk.

Vaskirúm og reingerðarrúm:

- Reingerðarvask skulu verða undirlímað í borðplátu.
- Spulikrani skal veitast til vaskirúm og reingerðarúm.

Rúm til vatnvirksemi:

- Gosbað, við sjálvreinsandi dýsum.
- Krani til gosbað.
- Vanligar brúsur í brúsuøkinum.
- Hondbrúsa í brúsuøkinum.
- Hitaklivi við infrareyðum ljósi til umleið 4-5 borgarar.

Ljós armaturir:
Skulu veljast í samstarvi við bygginevnd og Autismufelagið. Ráðgevin skal vegleiða um valmøguleikar, har hugsað verður serstakt um útbúnað, egnaður til fólk við autismu.

9.0. Heilsa, Trygd og Umhvørvi (HTU)

HTU skal verða ein týðandi partur av verkætlanini í prosjektering, útinning, rakstri og viðlíkahaldi, og starvsfólk skulu hava eitt gott arbeiðsumhvørvi bæði í tilgongdini til verkætlanina, undir bygging og tá bygningurin er tikin í nýtslu.

Skyldur javnfør ásetingunum í arbeiðsumhvørvislóggávuni og umhvørvislóggávuni skulu fylgjast.

Tryggjast skal, at ásetingarnar í "*Arbejdsministeriets bekendtgørelse nr. 1017 af 15. december 1993 om indretning af byggepladser og lignende arbejdssteder efter lov om arbejdsmiljø"*, ið er sett í gildi fyri Føroyar við "*kunngerð nr. 136 frá 4. september 1995 um reglur fyri byggipláss og líknandi arbeiðspláss"* við fylgiskjølum, verða fylgdar. Listi yvir loysnir innan arbeiðsumhvørvis viðurskifti, sum eru út yvir tað vanliga, skal gerast.

Ráðgevi skal tryggja í prosjektering, at byggiarbeiðið verður í mest møguligan mun framt í vanligari arbeiðstíð, tó kann henda, at neyðugt verður at skipa nakað av byggiarbeiðinum uttan fyri vanliga arbeiðstíð. Skipað samstarv skal verða millum byggifeløg, byggileiðslu, fakeftirlitið og starvsfólk, harundir byggifundir, sum meginregla verða hildnir hvørja ella aðruhvørja viku. Trygdarrunda og fundir verða sum meginregla hildnir 14. hvønn dag.

Tryggjast skal, at byggiarbeiðið verður lagt soleiðis til rættis, at tað sum heild verður til minst møguligan ampa fyri kringumstøðurnar. Arbeiðið skal skipast soleiðis, at tað elvir til minst møguligt óljóð, dálking og ferðslu í umhvørvinum. Fyribils ávísingar og vegleiðandi skelti skulu setast upp í samstarvi við byggiharran og avvarðandi kommunu.

HTU-ætlanin hjá Landsverki skal takast við í felagstreytunum. Sí fylgiskjal 02_HTU-ætlan. Tilfar og upplýsingar til HTU-ætlanina frá ráðgeva og arbeiðstakara skal latast byggiharra ella tí, sum vegna byggiharra er HTU-samskipari (trygdar-/arbeiðsumhvørvissamskipari).

Í verkætlanini skal HTU-samskipari knýtast at verkætlanini bæði í prosjektering og í útinning.

10.0. Fíggjarlig viðurskifti

Fíggjarliga rásarúmið til verkætlanina liggur á umleið 29,3 mió.kr.

11.0. Tíðarætlan

Víst verður til “Fylgiskjal 03_Tíðarætlan”.

12.0. Rakstur Og Viðlíkahald (ROV)

Endamálið við rakstrar- & viðlíkahaldsætlanini er at tryggja eitt framhaldandi, nøktandi viðlíkahald. Viðlíkahaldið skal leggjast til rættis og passast til raksturin av bygninginum annars. Í samljóði við funktiónskrøvini í byggiskránni, skal viðlíkahaldsstøðið verða viðvirkandi til at røkka dygdar- og haldgóða bygging:

Byggiharri krevur í hesari verkætlan talgilda avhendan. Tað er galdandi fyri allar upplýsingar, sum hava beinleiðis ávirkan á framtíðar rakstrarskeiðið. Treytirnar eru galdandi fyri allar arbeiðstakarar í verkætlanini.

Í hesum stykki eru yvirskipað krøv lýst, við tí endamáli at halda funktionella og fíggjarliga virði í bygningi og fríøkjum, herundir byggilist, -tøkni og dygd.

12.1 Prosjektering (ROV)

Bygningurin skal sniðgevast og gerast, soleiðis at rakstur og viðlíkahald av bygninginum verður skynsamt.
Val av tilfari skal stuðla upp undir skynsaman rakstur og viðlíkahald, umframt at val av tilfari skal tryggja:

- Eitt optimalt inniklima, uttan ampar av innandura flatum, herundir: gólv, veggir, loft v.m. sum fæst í samarbeiði við brúkara og rakstrarskipanina, grundað á tær veittu vegleiðingar og fyriskipanir frá arbeiðstakara.
- Ein tættan og byggitøkniliga rætt útførdan klimaskerm.
- Góðar og tryggar umstøður fyri brúkarar og gestir í bygningi og útiøkjum.
- Vælvirkandi og orkurættar tøknuligar innleggingar.

Allir lutir, ið krevja reingerð, ansing og røkt, skulu verða atkomuligir og skulu verða settir soleiðis, at arbeiðið at reinsa, ansa og røkja lutirnar/skipanirnar er trygt og nøktandi, herundir:

- Luftskiftisrør og rør í síni heild skulu verða sett so, at tað er møguligt at reinsa og røkja rørskipanina.
- Eftirlitslúkur herundir El-, HVS-, Ventilatión-, v.m.
- Talvir og skýggjar fyri El-, HVS-, Ventilatión-, v.m.
- Allar tøkniligar lutir v.m.

12.2 Gransking (ROV)

Valdar loysnir skulu granskast og verkætlanartilfarið skal góðskutryggjast viðvíkjandi rakstri og viðlíkahaldi fyri allar fasur í prosjekteringini. Gransking skal sum minsta mark fevna um:

- Inniklima
- Fólkatrygd
- Reingerð
- Viðlíkahald
- Rakstur
- Kostnað av teim oman fyri nevndu

Góðskutrygging skal sum minsta mark innihalda:

- Nøktandi støði á verkætlanartilfari
- Samanstoytsgreining millum fakbólkar
- Greið og fullfíggjað markamót
- Samsvar millum tekningar
- Samsvar millum skjøl
- Tíðarætlan
- Kostnaðarætlan

12.1. Avhendan (ROV)

Verkætlanin skal prosjekterast í Revit og hava ráðgevar til uppgávu at lata byggiharranum allar tekningar "sum bygt" av bygninginum eftir nærri avtalu við byggiharran og IKT avtalu.

Harumframt hava ráðgevar og arbeiðstakarar ábyrgdina av, at øll rakstrar-, eftirlits- og vegleiðingarskjøl (REV) verða latin byggiharranum.

Øll viðkomandi skjøl skulu veitast í forsnið, sum greitt frá í IKT avtalu. Skjøl sum skulu veitast eru:

- Vegleiðingar fyri REV:
    - Upplýsingar um allar byggilutir, elementir og komponentar, sum kunnu vegleiða rakstrarstarvsfólki í dagligum brúki, eftiransan og viðlíkahaldi.
    - Allir byggilutir, elementir og komponentar skulu nágreinast viðv. uppbygnað og funktión. Eisini skal væntað viðlíkahald, tíðarskeið, brúk og veitari upplýsast.
    - Evt. kunnan, upplæring og skeið.

- Viðlíkahaldsætlan
    - 10 ára viðlíkahaldsætlan skal veitast

- Ætlan um rakstrarkostnað
    - Skjøl um væntaðan kostnað av rakstri, veiting, orkunýtsla og reingerð
    - Meting um rakstrarkostnað skal gerast fyri 10 ára skeið, við kostnaðarstøði frá avhendingardegi.

- Garantiskjøl
    - Allar givnar ábyrgdir/trygdir, herundir einkultvøra og samansettir byggilutir, skulu latast til byggiharra, við avhendan.

- Dátubløð
    - Rakstrarviðkomandi vørufrágreiðingar, serliga veitarans vørublað.

- Byggilutakort og sermyndir av samanbyggingum
    - Veruligir upplýsingar um byggilutir og komponentar, og herundir rakstrar- og viðlíkahaldsupplýsingar.

- Innregulerings-, máti- og royndarfrágreiðingar
    - Innregulering-, máti- og royndarfrágreiðingar, sum eru gjørdar, tá ið farið verður í gongd við verkløg.

- "Sum bygt" tekningar og diagramm
    - Allar tekningar og diagramm, sum nýtt eru í sambandi við bygging, uppseting og tá ið farið verður í gongd við bygningar og verkløg.
    - Avtaluseðlar og skitsur.

- "Sum bygt" myndir
    - Allar myndir frá byggibyrjan til avhending
    - Myndir frá eftirlitinum
    - Myndir frá arbeiðstakara / veitara
    - Myndir frá byggileiðslu

13.0. Gransking og góðskutrygging

Ein góð gransking av eini verkætlan, er ein fortreyt fyri einum góðum úrsliti. Gransking eigur at verða framd, meðan prosjekteringin er ávegis. Somuleiðis eigur granskingin at fylgja byggingini og veiting av byggieindum.

Gransking fevnir um innanhýsis gransking og tvørfakliga gransking. Byggiharrin setur uttanhýsis gransking á verkætlanina - sí tíðarætlan. Alt framleitt tilfar skal veitast byggiharra og uttanhýsis granskarum í uppruna forritum so sum Revit, Word e.l fyri hvørt granskingarstig. Hetta er galdandi fyri byggiharra, byggiharraráðgeva og allar teir prosjekterandi partarnar fyri øll fak.

Minstamark fyri ráðgevaragransking eru ásetingarnar í "Ydelsesbeskrivelser 2012 – For Byggeri og Planlægning" kap. 3.
Fyri hvørt stig í prosjekteringini skal gransking fremjast og frágreiðing latast byggiharranum. Farast skal ikki undir næsta stig, fyrr enn góðkenning av undanfarna stigi fyriliggur frá byggiharra, og viðmerkingar eru arbeiddar inn í undanfarna stig.

14.0. Fylgiskjøl

Fylgiskjal 01_ Samband millum eindirnar
Fylgiskjal 02_ HTU-ætlan
Fylgiskjal 03_ Tíðarætlan

LM-078/2020

LANDSVERK
byggir land

Landsverk
Tinghúsvegur 5
P.O. Box 78
FO-110 Tórshavn

Tel. +298 340 800
Fax +298 340 801
lv@lv.fo
www.landsverk.fo